## Úttøka til Continental og World Trial

Hundar, sum luttaka fyri Seyðahundafelagið í kappingum uttanlands, skulu vera skrásettir í ISDS. Tað kann undir ongum umstøðum gevast undantak fyri hesum.

Kvalificeringar til uttanlandskappingar fara fram í árinum fyri kappingina – tvs hundar sum luttaka í 2012, hava kvalificerað seg í 2011.

Allar kappingar telja við í kvalificeringini, men bert 3 tey bestu úrslitini telja við.

Stig verða givin eftir niðanfyristandandi stigatalvu:

### Stigtalva

Nr. 1 fær 7 stig

Nr. 2 fær 6 stig

Nr. 3 fær 5 stig

Nr. 4 fær 4 stig

Nr. 5 fær 3 stig

Nr. 6 fær 2 stig

Nr. 7 fær 1 stig

Stendur á jøvnum millum tveir ella fleiri hundar, verða stigini av teimum kappingum, sum telja við, løgd saman, og tann sum hevur flest stig, vinnur sær plássið.

Stendur framvegis á jøvnum, verður hugt eftir hvør samanlagt hevur flest stig í OLF í teimum kappingum sum telja við. Stendur framvegis á jøvnum, hevur hugt eftir samanløgdu stiginunum í OLFD, OLFDS, OLFDSP og at enda eftir OLFDSPS.

Stendur framvegis á jøvnum, verður vinnarin funnin við lutakasti.

Í heilt serligum førum kann nevndin vrakað ein hund sum hevur vunnið sær rætt til at umboða Føroya Seyðahundafelag í uttanlandskappingum og velja ein annan hund í staðin.